gult cyan magenta svart



# Bíligasti sáttmálin yvirhøvur

*Sáttmálin fyri arbeiði á hotellum, matstovum og gistingahúsum er kanska tann bíligasti sáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag yvirhøvur. Hægsta viðbótin fyri arbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð er 15 krónur um tíman*

Rúnar Reistrup

Sersáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag/Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri arbeiði á hotellum, gistingarhúsum, matsovum v.m. er kanska tann bíligasti sáttmálin millum Føroya Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið er galdandi í løtuni.

Hetta sigur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag, Vígdis Johannesen.

Grundlønin hjá starvsfólki á matstovum og gistingarhúsum er sambært sáttmálanum tann sama, sum høvuðssáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag ásetur. Í løtuni er hesin satsur 83 krónur og 72 oyru um tíman.

Verður arbeitt uttan fyri vanliga arbeiðstíð, ið er tíðin millum klokkan 8.00 og 17.00, ásetur sáttmálin, at viðbót skal latast afturat vanligu tímalønini.

Her skilir sersáttmálin um arbeiði á hotellum, gistingarhúsum og matstovum seg frá høvuðssáttmálanum millum Arbeiðarafelagið og Arbeiðsgevarafelagið, við tað at viðbøturnar fyri óvanligar arbeiðstíðir eru væl lægri í sersáttmálanum fyri hotell, gistingarhús og matstovur enn í øðrum sáttmálum millum fakfeløgini.

## Kvøldararbeiði gevur lítið

Sersáttmálin fyri gistingarhús og matstovur býtir arbeiðið í tíðini uttan fyri vanliga arbeiðstíð upp í tveir bólkar. Annar er tilrættaløgd tíð, og hin er ótilrættaløgd tíð.

Sambært sersáttmálanum skal arbeiðsætlan gerast fyri 4 vikur ísenn. Hesa ætlan skulu starvsfólk hava í hendi í seinasta lagi 7 dagar áðrenn hon kemur í gildi. Er arbeiðið uttan fyri vanliga arbeiðstíð ásett í hesi arbeiðsætlan, verður tað mett sum tilrættalagt arbeiði.

Er talan um tilrættalagt arbeiði eitt gerandiskvøld millum klokkan 21.00 og 24.00 skal arbeiðsgevarin lata starvsfólkinum 2 krónur og 50 oyru í viðbót. Er talan um ótilrættalagt arbeiði, er viðbótin 5 krónur um tíman.

## 10 krónur jólaaftan

Fyri náttararbeiði gerandisdagar millum klokkan 00.00 og 07.00 skulu starvsfólkini á hotellum, gistingarhúsum og matstovum hava 7,50 í viðbót fyri, um talan er um tilrættalagt arbeiði. Eru arbeiðstímarnir ikki við í arbeiðsætlanini, skulu starvsfólkini hava 15 krónur um tíman í viðbót.

Hetta er tann største viðbótin, ið sáttmálin ásetur arbeiðsgevarunum at gjalda fyri arbeiði uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Tey, ið arbeiða ólavsøkudagarnar, jólaaftan, 1. mei og aðrar halgi- og merkisdagar, skulu sambært sáttmálanum hava 10 krónur í viðbót um tíman, um arbeiðið er við í arbeiðsætlanini, og 15 krónur, um arbeitt verður uttan at tað er tilrættalagt í arbeiðsætlanini.

## 7-mannabólkurin vísir sín stuðul

Rúnar Reistrup

7-mannabólkurin, ið umboðar 32 av landsins fakfeløgum, boðaði í yvirlýsing í gjár frá, at hann fult tekur undir við Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag í krøvum teirra til hotel, gistingarhús og matstovur um at fylgja galdandi sáttmála.

Tey 32 fakfeløgini nýta í yvirlýsing síni eisini høvið at heita á hotel og gistingarhús um at fylgja ásetingunum í sáttmálanum. Tey vísa til, at sáttmálin tryggjar tær sømdir, sum eru ein sjálvsagdur rættur hjá øllum starvsfólkum.

Havnar Arbeiðskvinnufelag og 7-mannabólkurin høvdu vóru týskvøldi á fundi, har millum annað málið um starvsfólkauppsagnirnar á Cafe Natúr var frammi.

# Fara ongantíð at fylgja sáttmálanum

*Limirnir í Gistingarhúsfelagnum siga seg ikki hava verið við til at gjørt sáttmálan fyri gitingarhús og matstovur, og tí fara teir ongantíð at fylgja honum í tí líki, hann er í nú. Men teir rætta kortini eina hond út og ásanna, at nú er tíðin komin at fáa skipað viðurskifti í lag á starvsfólka- og lønarøkinum*

Rúnar Reistrup

Týsdagin sendu Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag saman út eina yvirlýsing, har níggju navngivin gistingarhús og matstovur vórðu lagdar undir ikki at vilja virða rættin hjá starvsfólki at arbeiða eftir skipaðum arbeiðs- og lønarviðurskiftum. Orsøkin til yvirlýsingina var, sambært teimum báðum fakfeløgunum, at meginparturin av matstovunum og gistingarhúsunum í Føroyum, ikki vilja fylgja sáttmálanum fyri m.a. gistingarhús og matstovur, sum varð undirskrivaður millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag í 1999. Men sambært formanninum í Gistingarhúsfelagnum, Jeffri Johannesen, kunnu limirnir í felagnum á ongan hátt góðtaka hendan sáttmálan, tí teir vórðu ongantíð tiknir upp á ráð, tá hann varð gjørdur.

– Fram til samráðingarnar í 1999 æt sáttmálin - sersáttmáli millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag/Hotel Vágar. Hann umfataði sostatt bert arbeiðið á Hotel Vágum. Undir samráðingunum varð hann broyttur til at umfata arbeiðið á gistingarhúsum og matstovum sum heild, uttan at vit í Gitingarhúsfelagnum vórðu tikin upp á ráð, sigur Jeffri Johannesen.

## Stjórin á fundi

Stjórin á Hotel Vágum, Uni Danielsen, sum eisini var formaður í Gistingarhúsfelagnum um tað mundið, var til staðar undir sáttmálasamráðingunum.

Og sambært forkvinnuni í Havnar Arbeiðskvinnufelag, Vígdis Johannesen, umboðaði hann limirnar í Gistingarhúsfelagnum. Hon kallar tað tískil tvætl, tá Gistingarhúsfelagið nú sigur, at tað ikki varð tikið upp á ráð, tá sáttmálin varð broyttur til at umfata alla vinnuna heldur enn bara Hotel Vágar.

Men formaðurin í Gistingarhúsfelagnum stendur við sítt.

– Táverandi formaðurin var við undir samráðingunum, men hann gjørdi greitt beinanvegin, at hann ikki umboðaði Gistingarhúsfelagið, men Flogfelag Føroya og soleiðis eisini Hotel Vágar.

## Sáttmálin var eitt sjokk

Jeffri Johannesen sigur, at eingin av limunum í Gistingarhúsfelagnum eru limir Føroya Arbeiðsgevarafelag, og tískil fingu teir ikki boð um at møta upp til fund um samráðingarnar í 1999.

– Tí kom tað sum eitt sjokk, tá vit fingu at vita, at nú var sáttmálin millum Hotel Vágar og Arbeiðarafelagið broyttur til ein sáttmála um arbeiði á hotellum, gistingarhúsum og matstovum sum heild, sigur formaðurin í Gistingarhúsfelagnum.

Hann heldur tað vera órímiligt, at níggju gistingarhús og matstovur, sum ongantíð hava verið við til at gjørt sáttmálan, nú verða hongd út í eini yvirlýsing, tí tey ikki fylgja hesum sama sáttmála.

– Vit verða sagdir at bróta sáttmálar og hvørt av sínum, men vit hava ongantíð gjørt nakran sáttmála.

## Okkurt má gerast

Formaðurin í Gistingarhúsfelagnum ásannar, at nú málið um starvsfólkaviðurskiftini á matstovum og gistingarhúsum er komið upp at venda, er neyðugt at gera okkurt.

– Vit eru klárir yvir, at hetta tvingar okkum til at taka eina støðu og flyta okkum fram ímóti skipaðum viðurskiftum á starvsfólkaøkinum. Eg trúgvi, at tað fer at koma øllum til góðar, um vit fáa ein sáttmála at ganga eftir. Tað fer at gera alt nógv lættari, sigur Jeffri Johannesen.

Føroya Arbeiðarafelag og Gistingarhúsfelagið eru altso ikki ósamd í, at tað er brúk fyri skipaðum starvsfólka- og lønarviðurskiftum. Ósemjan liggur í sjálvum sáttmálanum, sum Gistingarhúsfelagið sigur seg ikki kunna góðtaka.

## Gistingarhúsfelagið ikki fakfelag

Í gjár skuldu limirnir í Gistingarhúsfelagnum á fund um støðuna. Hetta var fyrsti fundurin millum limirnar, síðan yvirlýsingina frá arbeiðarafeløgunum týsdagin legði teir undir ikki at virða sáttmálan.

Sum nú er, er Gistingarhúsfelagið ikki eitt fakfelag, men bert eitt áhugafelag. At samráða seg til sáttmálar fyri limir sínar, liggur tískil ikki millum heimildirnar hjá felagnum.

Jeffri Johannesen segði í gjár, at tað ikki var óhugsandi, at Gistingarhúsfelagið nú fer at gerast eitt fakfelag, sum kann taka samráðingar upp við onnur fakfeløg og kanska fáa í lag ein annan sáttmála.

Sambært formanninum í Gistingarhúsfelagnum fara limirnir í hvussu er ikki at ganga undir verandi sáttmála.

– Vit yvirliva ikki at fylgja hasum sáttmálanum, tí hendan vinnan hevur so lítið av pengum, at verandi sáttmáli máðar støðið undan okkum, um vit fylgja honum.



*Stendur tað til limirnar í Gistingarhúsfelagnum, fara starvsfólk í matstovu- og hotelvinnuni ongantíð at fáa løn sambært galdandi sáttmála. Men at tey í framtíðini skulu arbeiða sambært skipaðum viðurskiftum, tykjast øll at vera samd um.*

*Tilvildarlig mynd*

gult cyan magenta svart



# Gera ov ofta politikk til jura

*Skrivarin í grundlógarnevndini heldur, at føroyskir politikarar eru alt ov varnir at taka politiskar avgerðir. Tí verður politikkurin alt ov ofta gjørdur til juridiskar kanningar*

John Johannessen

Løgtingið, við landsstýrismálanevndini sum amboð, eigur at taka greiðari støður um, hvørjar avleiðingar mistøk hjá landsstýrismonnum eiga at fáa.

Hetta heldur skrivarin í grundlógarnevndini, Kári á Rógvi, sum er útbúgvin løgfrøðingur.

Tað er sambært Kára á Rogvi óheppið, at løgfrøðisligur kanningarstjóri verður settur at kanna embætisførsluna hjá landsstýrismanni, hvørja ferð tingmenn halda ein landsstýrismann hava borið seg skeivt at.

Kári á Rógvi heldur, at hetta er eitt amboð, sum tingmenn sjálvsagt kunnu brúka, men sum teir í løtuni brúka ov ofta.

– Tað er tingið, ið eigur at geva landsstýrismonnum nøs, metir tingið teir hava borið seg skeivt at. Síðani eigur løgmaður, sum hevur ábyrgdina fyri landsstýrinum, at taka avgerðina hjá tinginum til eftirtektar, ger Kári á Rógvi greitt.

## Alt ov nógvar kanningar

Seinastu tíðina hava fleiri landsstýrismenn verið viðgjørdir í landsstýrismálanevndini. Millum annað er ein kanningarstjóri í løtuni í ferð við at kanna embætisførsluna hjá Signari á Brúnni, tá hann játtaði Sjónvarpinum pening uttan heimild frá løgtinginum.

Kanningarstjórin varð settur, eftir at 13 av tinglimunum heittu á løgtingsins formansskap, um at seta ein kanningarstjóra.

Men sambært Kára á Rógvi er ikki neyðugt, at eitt slíkt mál skal koma so langt.

– Tað eigur ikki at vera neyðugt at seta ein kanningarstjóra, hvørja ferð ivi er um ein landsstýrismann. Tað er heldur landsstýrismálanevndin, sum amboð hjá løgtinginum, ið eigur at gera løgmanni greitt, um hon hevur álit á landsstýrismanninum ella ikki, heldur Kári á Rógvi.

Síðani skal støða takast til, hvørjar avleiðingar málið skal fáa fyri landsstýrismannin. Hann kann til dømis fáa eina átalu ella missa sessin, um hetta verður mett neyðugt. Kári á Rógvi vísir tó á, at tað ikki altíð er neyðugt, at landsstýrismaðurin skal missa sessin.

– Føroyskir politikarar eiga at duga betur at skilja ímillum gula og reyða kortið, tá teir viðgera mistøk hjá landsstýrismonnum, ger løgfrøðingurin greitt.

## Eigur forrættindini

Løgmaður vágar sær ikki at tilnevna Tórbjørn Jacobsen til landsstýrisman, tí játtan fyriliggur ikki frá løgtinginum til løn hansara. Men Kári á Rógvi sigur, at forrættindini hjá løgmanni eiga at viga tyngri enn játtanarlógin í hesum føri.

– Tingið eigur at lata løgmann røkja síni forrættindi. Løgmaður eigur at kunna tilnevna landsstýrismannin, og síðani eigur tingið at játta pening til lønina hjá landsstýrismanninum seinni, sigur Kári á Rógvi.

Løgfrøðingurin vísir á, at hetta er heilt vanlig mannagongd til dømis í Danmark. Tingið virðir avgerðina hjá stjórnarleiðaranum, og peningurin, avgerðin kostar, verður játtaður.



*Kári á Rógvi, løgfrøðingur, heldur, at løgtingið eigur at taka greiðari støður um, hvørjar avleiðingar mistøk hjá landsstýrismonnum eiga at fáa*

Í Danmark er siðvenjan tann, at fíggjarnevndin játtar pengar til útreiðslur, sum metast mugu at hava undirtøku í tinginum. Hetta er galdandi sjálvt um útreiðslurnar ikki hava skund. Í Føroyum er løgd ein nógv strangari siðvenja.

– Hendan siðveja merkir, at sjálvt útreiðslur, sum heilt vist verða játtaðar, formliga skulu fyri tingið - og ikki bert fyri fíggjarnevndina, vísir Kári á Rógvi á.

## Spurningur um siðvenju

Hvat løgmaður enn velur at gera í sambandi við landsstýrissessin hjá Tórbjørn Jacobsen, so skapar hann fyridømi í føroysku stýrisskipanini.

Kári á Rógvi vísir á, at um løgmaður velur at taka tað politiska stigið at nýta sína løgfrøðiligu heimild at seta landsstýrismannin beinanvegin, so er tað upp til løgtingið at reagera.

– Tingið kann velja at góðtaka sum siðvenju í Føroyum at landsstýrismaðurin fyrst verður settur, og at peningurin síðani verður játtaður seinni.

– Tingið kann eisini velja at vera ímóti slíkari siðvenju og geva løgmanni gult ella reytt kort. Gula kortið kann vera ein tingsamtykt ella ein átala frá eini tingnevnd. Reyða kortið er at geva løgmanni misálit, sigur Kári á Rógvi.

## Grundlógin verður greiðari

Orsøkin til, at løgmaður ikki vágar sær at tilnevna Tórbjørn Jacobsen sum landsstýrismann, tí tingið ikki hevur játtað pening til løn hansara er, at stýrisskipanarlógin í einum føri gevur løgmanni rætt til hetta, men í øðrum føri sigur, at hann skal hava játtan frá løgtinginum.

Í grein 27, stykki 2, í stýrisskipanarlógini stendur, at tað er løgmaður, sum ásetur, hvussu nógvir landsstýrismenn skulu vera í landsstýrinum. Og eisini er tað løgmaður, sum tilnevnir landsstýrismenninar.

Men hin greinin, nevniliga grein 43, stykki 2, sigur, at eingin útreiðsla má verða goldin, uttan so, at heimild er fyri henni í galdandi fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, tá ávíst verður.

Slíkar mótsagnir ætlar grundlógarnevndin sær at lúka burtur í grundlógini, hon í løtuni arbeiðir við at gera.

Kári á Rógvi sigur, at grundlógarnevndin er so mikið heppin, at hon hevur stýrisskipanarlógina at taka støði í, tá hon ger grundlógina, og tí kann hon bøta um trupulleikarnar, sum eru í stýrisskipanarlógini.

Hetta fer tó ikki at loysa spenningin, sum altíð er millum stjórn og ting. Men kortini roknar Kári á Rógvi við, at grundlógin hevði gjørt, at vit sleppa undan øllum kanningunum, sum nú í heilum verða gjørdar av landsstýrismonnum.



# Avdottin fáa frið í góðveðri

*Á Politigarðinum vóna tey, at tað verður turt á ólavsøku. Hetta léttir um arbeiðsbyrðuna, tí avdottin fólk koma fyri seg aftur, um tey fáa ein blund*

Dia Midjord

Á politistøðini í Havn eru tey klár at taka ímóti ólavsøkugestunum. Peter Poulsen, varapolitiinspektørur, sigur, at tað léttir munandi um arbeiðsbyrðuna, um veðrið er gott á ólavsøku.

Og er veðrið ringt, so er váttligt á politistøðini í Havn.

– Tað ber ikki til hjá okkum at lata avdottin fólk liggja og sløðast í ringum veðri. Er veðrið ringt hava vit nógv fleiri vitjanir, sigur Peter Poulsen.

Hann sigur, at góða veðrið fyri ein stóran part ger arbeiðið hjá teimum léttari.

– Er onkur avdottin í góða veðrinum og ikki beinleiðis liggur til hindurs, so ber til at lata henda persónin sova víðari.

## 20-30 gestir

Veðrið hevur nógv at siga, hvussu stórt ella lítið talið av vitjandi er um ólavsøkuna. Men vanliga liggur hetta tal eina staðni millum tjúgu og tredivu persónar.

– Vit hava bert fýra klivar, so tað kann gerast trongt á ólavsøku, um stevnuveðrið er vánaligt.

Peter Poulsen leggur aftrat, at løgreglan hevur nógvar aðrar uppgávur enn bert at koyra runt og samla saman avdottin fólk.

– Telefonirnar ganga heitar á ólavsøku og nógv fólk kemur á gátt. Eisini hjálpa vit til við fleiri tiltøkum, sum súkkling, skrúðgongu og øðrum.

Samanumtikið heldur Peter Poulsen, at ólavsøkan er friðarlig.

– Tá vit hugsa um, at so nógv fólk eru saman og so nógv verður drukkið, tá mugu vit siga, at talan er um friðarligar ólavsøkur.

Men skuldi okkurt álvarsligt hent, so eru tey klár á politistøðini. Eins og undanfarin ár kemur styrkur av bygd, so tey verða hálvaaðru ferð so nógv, sum tey eru vanligar dagar.

TRANSIT®
PAR - SUCH
ALT TRANSIT
í hvítum niðursett:
30-50%
Draktir – Jakkar
Buksur – Niðurdeilar
Blusur – Kjólar
29
Tr ndarg¿tu
tel. 31 82 00
ella 21 81 99